LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 19. august 2021
J.Nr.: LUM-00- 21/03259-17
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Skriv viðvíkjandi geyma til talgilda samleikan**

Umboðsmaðurin fekk fyrispurning frá einum borgara um Talgildu Føroyar hava rætt at krevja gjald fyri at lata talgilda samleikan á einum geyma.

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna málið nærri.

Tann 18. mars 2021 sendi umboðsmaðurin Fíggjarmálaráðnum soljóðandi skriv:

> "...
> Umboðsmaðurin hevur fingið ein fyrispurning frá einum borgara um, at Talgildu Føroyar hava rætt at krevja gjald fyri, at Samleikin kann fáast á ein geyma.
>
> Sambært heimasíðuni samleikin.fo stendur soleiðis um kostnaðin av geymanum:
>
> "Samleikin kann eisini fáast á einum serligum geyma. Hesin fæst til keyps hjá brúkaratænastuni á Staravegi 9 í Havn. Kostnaðurin er 350 kr."
>
> Sambært § 6, stk. 5 í umboðsmanslógini kann umboðsmaðurin sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
>
> Heitt verður á Fíggjarmálaráðið um at greiða umboðsmanninum frá heimildini um ásetta gjaldið fyri geyman.
>
> Í fyrispurninginum frá borgaranum sæst, at borgarin kundi fáa geyman við at møta upp hjá Brúkaratænastuni hjá Talgildu Føroyum í Tórshavn. Umboðsmaðurin ynskir at vita, um tað er eitt krav, at borgarin skal heinta geyman sjálvur, ella um møguleiki er fyri, at borgarin fær geyman sendandi við postinum? Fyri summar borgarar kann tað vera ein stór avbjóðing at møta upp á staðnum.
> ..."

Tann 12. mai 2021 gav Fíggjarmálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

> "...
> Heimildin at taka gjald fyri Samleikageyman er í løgtingslóg nr. 69 frá 9. mai 2019 um talgildan samleika § 11, nr. 2.
>
> Fyri at fáa Samleika á geyma er neyðugt at møta persónliga upp í brúkaratænastuni hjá Talgildu Føroyum á Staravegi 9 í Havn. Tvær høvuðsorsøkir eru til, at neyðugt er at møta upp persónliga:
>
> 1) Fyri at tryggja, at viðkomandi - ið fær Samleikageyman útflýggjaðan – er tann, ið viðkomandi sigur seg vera. Hetta fylgir altjóða krøvum á hesum øki.
> 2) Brúkarin skal sjálvur virkja (aktivera) sín Samleika við at seta geyman inn í serliga teldu og velja sær eitt persónligt loynital á staðnum. Vegna serliga krøv til KT-trygd, er hendan teldan knýtt við kaðalsambandi niður í Samleika "maskinrúmið", ið eisini er hýst á Staravegi 9.

Tað kann leggjast afturat, at talan er um ein serligan geyma, ein krypto-geyma, sum kostar uml. 300 kr.
…"

Umboðsmaðurin helt ikki, at frágreiðingin frá Fíggjarmálaráðnum til fulnar lýsti tey ivamál, ið umboðsmaðurin hevði og setti tískil tann 25. mai 2021 Fíggjarmálaráðnum soljóðandi spurningar:

"…
Í svarinum siga tit, at heimildin fyri at taka gjald fyri Samleikageyman er at finna í § 11, nr. 2 í løgtingslóg nr. 69 frá 9. mai 2019 um talgildan samleika.

§ 11 er soljóðandi:

"**§ 11.** Landsstýrismaðurin kann áseta gjald fyri:
1) Luttøku hjá tænastuveitara sambært §§ 4 og 5, undir hesum íbindingargjald, rakstrargjald, tænastugjald o.tíl.
2) Lyklabera hjá brúkara."

Á s. 14 og 15 í LM-160/2018 : Uppskot til løgtingslóg um talgildan samleika, stendur soleiðis:

**"2.12. Gjøld**
Landsstýrismaðurin kann áseta gjald fyri:
1) luttøku hjá tænastuveitara sambært §§ 4 og 5, undir hesum íbindingargjald, rakstrargjald, tænastugjald o.tíl.
2) lyklabera hjá brúkara.

Her verður serliga hugsað um gjald fyri útreiðslur hjá landsstýrismanninum í sambandi við at knýta talgilda samleikan til talgildu tænasturnar hjá tænastuveitarum, umframt rakstrarútreiðslur. Gjaldið má ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í sambandi við ta ítøkiligu tænastuna.

Ætlanin er, at tað sum útgangsstøði skal vera ókeypis fyri borgaran at fáa og nýta sín talgilda samleika. Í ávísum førum kann tó verða neyðugt at krevja eitt ávíst gjald, t.d. um brúkarin í fleiri umførum innan fyri stutt tíðarskeið biður um nýggjan fysiskan lyklabera, t.d. av tí at hann í ósketni hevur mist hann burtur."

Á s. 27 í sama uppskoti eru serligu viðmerkingarar til § 11, ið eru soljóðandi:

**Til § 11**
Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta nágreiniligari reglur um gjald fyri ávísar útreiðslur, sum landið hevur av talgilda samleikanum.

Her verður serliga hugsað um gjald frá tænastuveitarum fyri útreiðslur í samband við at knýta talgilda samleikan til tænastur hjá tænastuveitaranum umframt rakstrarútreiðslur. Gjaldið má ikki vera hægri enn útreiðslurnar, sum eru av virkseminum í samband við ta ítøkiligu tænastuna.

Ætlanin er, at tað sum útgangsstøði skal vera ókeypis fyri borgaran at fáa og nýta sín talgilda samleika. Í ávísum førum kann tó verða neyðugt at krevja eitt ávíst gjald, t.d. um brúkarin í fleiri umførum innan fyri stutt tíðarskeið biður um nýggjan fysiskan lyklabera, t.d. av tí at hann í ósketni hevur mist hann burtur.

Ein lyklaberi er tólið hjá brúkaranum, ið talgildi samleikin (privati lykilin) liggur á. Hetta verður sum útgangsstøði á eini app á snildfon/teldli ella á einum fysiskum USB-lykli.
…"

Hevur landsstýrismaðurin ásett nágreiniligar reglur um gjald fyri lyklabera hjá brúkara?

Metir Fíggjarmálaráðið, at ásetta fasta gjaldi fyri geyman samsvarar við ætlanina, ið nevnd er í serligu viðmerkingum til § 11?

Er møguleiki fyri at tey, ið av onkrari orsøk als ikki fáa møtt sjálvi upp hjá brúkaratænastuni á Staravegi 9 í Havn, kunnu geva øðrum fulltrú at virka teirra vegna? Her verður serliga hugsa um tey, ið bera brek ella eru sjúk.
..."

Tann 21. juni 2021 gav Fíggjarmálaráðið umboðsmanninum soljóðandi frágreiðing:

"...
Sum umboðsmaðurin nevnir, so tekur Gjaldstovan eitt gjald á kr. 350 fyri ein serligan geyma til talgilda samleikan. Teir persónar, sum ikki hava fartelefon ella teldil, kunnu bert fáa talgilda samleikan, um tey hava ein slíkan geyma.

Tit hava sett okkum hesar spurningar:

1)
Hevur landsstýrismaðurin ásett nágreiniligar reglur um gjald fyri lyklabera hjá brúkara?

2)
Metir Fíggjarmálaráðið, at ásetta gjaldið fyri geyman samsvarar við ætlanina, ið nevnd er í serligu viðmerkingunum til § 11?

3)
Er møguleiki fyri at tey, ið av onkrari orsøk als ikki fáa møtt sjálvi upp hjá brúkaratænastuni á Staravegi 9 í Havn, kunnu geva øðrum fulltrú at virka teirra vegna? Her verður serliga hugsa um tey, ið bera brek ella eru sjúk.

**Ad 1)**
...
Landsstýrismaðurin hevur ikki enn ásett nágreiniligar reglur fyri eitt slíkt gjald. Fíggjarmálaráðið kann tó upplýsa, at landsstýrismaðurin fer at áseta nærri reglur fyri gjaldið í kunngerð og hetta verður gjørt skjótast til ber.

**Ad 2)**
Fíggjarmálaráðið er varugt við, at tað í serligu viðmerkigunum til grein 11 stendur at "*Ætlanin er, at tað sum útgangsstøði skal vera ókeypis fyri borgaran at fáa og nýta sín talgilda samleika. Í ávísum førum kann tó verða neyðugt at krevja ávíst gjald, t.d. um brúkarin í fleiri umførum innan fyri stutt tíðarskeið biður um nýggjan fysiskan lyklabera, t.d. av tí at hann í ósketni hevur mist hann burtur.*"

Vísandi til at kunngerðin ikki er gjørd og til upprunaligu ætlanina um at geymin skuldi vera ókeypis, metir Fíggjarmálaráðið tað vera rættast, at teir persónar, sum longu hava goldið fyri geyman, fáa peningin aftur.

Landsstýrismaðurin fer innan stutta tíð at áseta nærri reglur fyri gjald fyri geyman. Í kunngerðini fer at verða ásett, at fyrsti geymin verður ókeypis. Um so er, at ein borgari missur geyman burtur og biður um ein nýggjan geyma, skal borgarin rinda fyri næsta geyman.
Ætlanin er eisini at nágreina í kunngerðini, at geymin bert er ætlaður teimum borgarum, sum ikki hava fartelefon ella teldil, og tí verður fyrsti geymin bert ókeypis fyri hesar borgarar.

Fíggjarmálaráðið metir, at omanfyrinevdu reglur, sum nú verða ásettar í kunngerð, eru í samsvar við upprunaligu ætlanina við talgilda samleikanum, sum er lýst í serligu viðmerkingunum til grein 11.

**Ad 3)**

> Tað ber ikki til at geva øðrum persóni fulltrú at virka sína vegna, tá talan er um at stovna sær ein talgildan samleika. Hetta er av trygdarávum – tað eru sera strong altjóða krøv tengd at talgilda samleikanum, og tí ber hetta ikki til.
>
> Hesi altjóða krøv framganga í ES fyriskipan nr. 910/2014 ...
>
> ...”

**Viðmerkingar frá umboðsmanninum**

Gjøld, ið almennir myndugleikar áleggja borgarum fyri tænastur ella veitingar, krevja sum meginreglu heimild í lóg ella kunngerð.

Fíggjarmálaráðið ásannar í omanfyrinevndu frágreiðing síni til mín, at ráðið ikki hevur ásett nærri reglur fyri gjaldið á 350 kr., ið Talgildu Føroyar hava kravt fyri geyman til talgilda samleikan.

Fíggjarmálaráðið upplýsir, at ráðið skjótast gjørligt fer at áseta reglur í kunngerð um, at Talgildu Føroyar kann krevja eitt ávíst gjald fyri geyman.

Fíggjarmálaráðið upplýsir harumframt, at ráðið fer at endurrinda kostnaðin til teir borgarar, ið longu hava fingið útflýggjað geyman og goldið fyri hann.

Hetta taki eg til eftirtektar.

Fíggjarmálaráðið upplýsir eisini, at ráðið í kunngerð fer at knýta ávísar treytir afturat reglunum um gjald fyri geyman. Grundað á frágreiðingina meti eg, at hesar treytir samsvara við almennu og serligu viðmerkingarnar til løgtingslóg nr. 69 frá 9. mai 2021, ið nevndar eru omanfyri.

Fíggjarmálaráðið greiðir harafturat frá, at altjóða trygdarkrøv, ið samsvara við viðkomandi ES lóggávu, gera tað neyðugt at  at borgarar, ið ikki hava fartelefon ella teldil, mugu møta persónliga  á staðum til tess at fáa ein geyma til talgilda samleikan. Hetta taki eg til eftirtektar og gevi mær samstundis far um, at ein borgari, ið ikki hevur talgilda samleikan, nú eins og áður kann fáa avgreitt síni viðurskifti við vanligum brævi.

Eg fari at heita á Fíggjarmálaráðið um at kunna meg um tær reglur, ið ráðið fer at áseta um gjald fyri geyman til talgilda samleikan.

Hetta skriv verður í næstum lagt á heimasíðu okkara www.lum.fo í navnleysum líki.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður